**Bygdaráðsfundur 28.11.2022 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 118/2022 – Byggiloyvi til havastovu – Alfred Olsen | ALMENT |
| Mál nr. 119/2022 – Byggiloyvi til sethús – Aloma Carlsen og Catalyn Galiceanu | ALMENT |
| Mál nr. 120/2022 – Byggiloyvi til sethús – Helga og Absalon í Frammistovu | ALMENT |
| Mál nr. 121/2022 – Byggiloyvi til bilhús – | ALMENT |
| Mál nr. 122/2022 – Byggiloyvi til bilhús – Eyðbjørn Hansen | ALMENT |
| Mál nr. 123/2022 – Leiðari til Barnagarðin | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 124/2022 – Eyka tímar til barn við serligum tørvi – Frítíðarskúlin | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 125/2022 – Bygdaráðsfundir og nevndarvikur 2023 | ALMENT |
| Mál nr. 126/2022 – Fíggjarætlan 2023 – Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | ALMENT |
| Mál nr. 127/2022 – Reguleringar til Fíggjarætlanina 2022 1. viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 128/2022 – Fíggjarætlanin 2023 – Nes kommuna 3. viðgerð | ALMENT |

**Mál nr. 118/2022 – Byggiloyvi til havastovu – Alfred Olsen ALMENT**
J.nr. : 1201-10-2022

Í umsókn, dagfest tann 24.10.2022, søkir Alfred Olsen um byggiloyvi til havastovu.

Ætlanin er at havastovan skal vera í somu hædd sum túnið og og suður til 2,5m frá grannamarkinum. Havastovan verður 4,5m lang, 3m breið og 2,5m høg við lágari reising. Staðsetingin verður soleiðis, at ovara síðan verður í flukt við ovaru síðu á húsunum.

**Á fundi, tann 16.11.2022, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 119/2022 – Byggiloyvi til sethús – Aloma Carlsen og Catalin E. Galiceanu ALMENT**
J.nr. : 1201-11-2022

Í teldubrævi, tann 24.10.2022, søkja Aloma Carlsen og Catalin Eugen Galiceanu um byggiloyvi til sethús á matr. 474w á Lýðarsvegi.

Húsini eru í tveimum hæddin har ovarahæddin er ájavnt við vegin. Húsini eru 9m breið og uml. 15m lang og afturat kemur bilhús sum er uml. 7m langt og 4,6m breitt.

**Á fundi, tann 16.11.2022, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 120/2022 – Byggiloyvi til sethús – Helga og Absalon í Frammistovu ALMENT**
J. nr.: 1201-13-2022

Í umsókn tann 23.11.2022, søkir KBH vegna Helgu og Absalon í Frammistovu um byggiloyvi til sethús matr. nr. 699f.

Húsini eru í tveimum hæddum, við lágari reising og eru 12,5m lang og 9,5m breið við innbygdum bilhúsi.

> **Á fundi, tann 28.11.2022, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært fyribils tekningum dagfestar 17.11.2022.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 121/2022 – Byggiloyvi til bilhús – ALMENT**
J. nr.: 234022-2-2018

**Einmælt samtykt at beina málið aftur í Teknisku nevnd.**

**Mál nr. 122/2022 – Byggiloyvi til bilhús – Eyðbjørn Hansen ALMENT**
J.nr. : 1201-12-2022

Í teldubrævi, dagfest tann 04.11.2022, søkir Eyðbjørn Hansen um byggiloyvi til bilhús. Ætlanin er at umvæla verandi hoyggjhús til bilhús. Dekk er longu stoypt, og restin verður gjørt við timbri.

Bilhúsið verður uml. 9m breitt og 7m langt.

> **Á fundi, tann 16.11.2022, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt. .**

**Mál nr. 125/2022 – Bygdaráðsfundir og nevndarvikur 2023 ALMENT**
J. nr.: 1101-8-2022

Umsitingin hjá kommununi mælir til at bygdaráðsfundir og nevndarvikur í 2023 verða ásett sum fylgjandi.

Bygdaráðsfundir:
Mánadagin 30. januar
Mánadagin 27. februar
Mánadagin 27. mars
Mánadagin 24. apríl
Mánadagin 29. mai
Hósdagin 22. juni
Mánadagin 28. august
Mánadagin 25. september
Mánadagin 30. oktober
Mánadagin 27. november

Nevndarvikur:
3-4
7-8
11-12
15-16
20-21
24-25
33-34
37-38
42-43
46-47

**Á fundi, tann 24.11.2022, mælir Fíggjarnevndin til at bygdaráðsfundirnir og nevndarvikurnar 2023 verða sum ásett omanfyri.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 126/2022 – Fíggjarætlan 2023 – Barnaverndartænastan við Skálafjørðin ALMENT**
J. nr.: 1802-9-2022

Barnaverndartænastan við Skálafjørðin hevur sent fíggjarætlan fyri 2023 til ummælis hjá Nes kommuna.

Fíggjarætlanin 2023 hjá Barnaverndartænastuni er uppá tkr. 11.403. Parturin hjá Nes kommunu er 21,23% ella tkr. 2.421.

**Á fundi, tann 24.11.2022, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2023 hjá Barnaverndartænastuni við Skálafjørðin soleiðis sum hon er uppsett.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 127/2022 – Reguleringar til Fíggjarætlanina 2022 1. viðgerð ALMENT**

J. nr.: 1107-8-2021

Reguleringar á fíggjarætlanini 2022 – 1. viðgerð.

Fyrisitingin hevur gjøgnumgingið raksturin higartil í ár, framroknað árið 2022 og samanborið við løgdu fíggjarætlanina fyri 2022. Fyrisitingin mælir til fylgjandi reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2022:

| **Rakstur** | **tkr.** |
|---|---:|
| §1 Kommunal Fyrisiting | -196 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | -393 |
| §3 Børn & Ung | -382 |
| §4 Undirvísing | -34 |
| §5 Mentan & Frítíð | 297 |
| §6 Teknisk mál | 400 |
| §7 Kommunal virki | -42 |
| **Rakstur í alt** | **-350** |
| | |
| **Rentustuðul og Rentuútr.** | **225** |
| | |
| **Reguleringar í alt áðrenn íløgur** | **-125** |

| **Íløgur** | |
|---|---:|
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 96 |
| §3 Børn og ung | 0 |
| §4 Fólkaskúlin | 200 |
| §5 Mentan og Frítíð | 32 |
| §6 Teknisk mál | -208 |
| §7 Kommunalt virki | 5 |
| **Íløgur í alt** | **125** |

**Reguleringar rakstur og íløgur 0**

**Á fundi, tann 24.11.2022, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum fyri 2022.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 128/2022 – Fíggjarætlanin 2023 – Nes kommuna 3. viðgerð ALMENT</u>**
<u>J. nr.: 1107-2-2022</u>

1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2023 var fyri á bygdaráðsfundi 26.09.2022, og 2. viðgerð tann 31.10.2022.

**Á arbeiðsfundi 27.10.2022 mælir Fíggjarnevndin til at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 5.500.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á arbeiðsfundi 27.10.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2023 soleiðis sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 2.910 verður fíggjað við tøkum peningi. Íløgurnar á tkr. 17.092 verða fíggjaðar við rakstaravlopi á tkr. 8.866, lántøku á tkr. 8.000 og tøkum peningi á tkr. 226.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

Tann 15.11.2022 er í telduposti komin seinna metingin frá Fíggjarmálaráðnum uppá eftirlønargjøld og flyting vegna Dis, Fas og frádráttir. Ein meirinntøka á tkr. 414 er í metingini vegna eftirlønarinngjøldunum og ein meirinntøka á tkr. 24 er í metingini viðv. Dis, Fas og frádráttir.

Tann 01.11.2022 er í telduposti komin seinna metingin frá Taks uppá skattainntøkuna. Hendan gevur eina meirinntøka á tkr. 430.

Á fundi 25.11.2022 mælir Fíggjarnevndin til at umframt tær tkr. 800, ið eru settar av til asfaltering eftir Regnvegnum,verða tkr. 700 settar av afturat, tvs. í alt tkr. 1.500.

Omanfyri nevndu inntøkur/útreiðslur eru innroknaðar í 3. viðgerð.

**Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til 3. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2023, hjá Nes kommunu, eftir omanfyri nevndu broytingar vera hesi:**

| **Rakstur tkr.** | **2023** | **2022v/eykaj.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 6.043 | 5.245 | 798 | 15,2 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 22.327 | 20.849 | 1.478 | 7,1 |
| §3 Børn og ung | 14.384 | 14.750 | -366 | -2,5 |
| §4 Undirvísing | 5.135 | 4.520 | 615 | 13,6 |
| §5 Mentan og frítíð | 4.930 | 4.560 | 370 | 8,1 |
| §6 Teknisk mál | 6.734 | 5.140 | 1.594 | 31,0 |
| §7 Kommunalt øki | 3.950 | 3.872 | 78 | 2,0 |
| **Rakstur í alt** | **63.503** | **58.936** | **4.567** | **7,7** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **72.537** | **67.264** | **5.273** | **7,8** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **9.034** | **8.328** | **706** | **8,5** |
| | | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 0 | 0 | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 70 | 439 | -369 | -84,1 |
| §3 Børn og ung | 350 | 1.003 | -653 | -65,1 |
| §4 Undirvísing | 2.400 | 2.350 | 50 | 2,1 |
| §5 Mentan og frítíð | 5.550 | 1.350 | 4.200 | 311,1 |
| §6 Teknisk mál | 1.083 | 5.854 | -4.771 | -81,5 |
| §7 Kommunal virki | 7.639 | 9.510 | -1.871 | 19,7 |
| **Íløgur í alt** | **17.092** | **20.506** | **-3.414** | **-16,6** |
| | | | | |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **-8.058** | **-12.178** | **4.120** | **33,8** |
| | | | | |
| **Afturgjald av skuld** | **2.910** | **2.910** | **0** | **0** |
| | | | | |
| **Av tøkum peningi** | **2.968** | **3.088** | **120** | **3,9** |
| | | | | |
| **Lántøka** | **8.000** | **12.000** | **4.000** | **0,3** |

**Á fundi, tann 24.11.2022, mælir Fíggjarnevndin til at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádráttur verður óbroyttur kr. 5.500.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi, tann 24.11.2022, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við 3. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2023 soleiðis sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 2.910 verður fíggjað við tøkum peningi. Íløgurnar á tkr. 17.092 verða fíggjaðar við rakstraravlopið á tkr. 9.034, lántøku á tkr. 8.000 og tøkum peningi á tkr. 58.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**